## Kjarnorkuvápn til palestinar

Síðani libyski leiðarin, Moammar Gaddafi, slapp aftuir á altjóða pallin, hevur hann av og á gjørt vart við síni heldur óvanligu sjónarmið, og tað hevur hann gjørt aftur nú. Við bretska sjónvarpið Sky News sigur hann, at er tað rætt, at Ísrael hevur kjarnorkuvápn, so mugu Egyptaland og Saudiarabia - ja, sjálvt palestinar hava rætt til at fáa sær somu vápn. Hugsanin hjá Gaddafi er, at hava palestinar ikki rætt til at fáa sær kjarnorkuvápn, so eigur Ísrael at missa síni, um teir hava tey.



## Rakti veiðimann við skoti

Tveir norskir veiðimenn, sum vóru á veiðiferð í Overhalla-økinum leygardagin, komu út fyri eini keðiligari hending, sum kundi verið uppaftur verri. Teir høvdu gingið og malið einsamallir í nógvar tímar, tá annar helt, at hann sá in fugl, sum hann skuldi skjóta. Tá hann skeyt, var tað hin veiðimannin, hann rakti. Hin óhepni veiðimaðurin – tann sum varð skotin – fekk fleiri høgl í andlitið úr umleið 25 metra fjarstøðu. Onnur høgl raktu niðan fyri hjarta, nær eygkakrókinum og báðu megin eina høvuðspulsæðr. Nú liggur rakti veiðimaðurin á St. Olavs sjúkrahúsi í Tróndheimi



*Tá ið Jógvan Fríðrikson, bispur, handaði Hilmari Bech heiðursteknið, segði hann at hendan viðurkenningin er ein tøkk á serliga høgum støði*

# Heiðraður fyri trúgva og drúgva tænastu

**Í gjár fekk Hilmar Bech í Porkeri heiðurstekin frá drotningini fyri trúgva og drúgva tænastu**

HEIÐURSTEKIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg fari at framberа mína hjartans tøkk til alt kirkjufólkið fyri allar tær trúarstyrkjandi stundir, vit hava havt saman í kirkjuni, bæði í gleði og í sorgarløtum.

Tað var ein ikki sørt gleður Hilmar Bech, sum stóð á kórsgáttini í Kirkjuni í Porkeri í gjár.

Hann hevði akkurát fingið heiðurstekin frá drotningi fyri trúgva og drúgva tænastu í Porkeris Kirkju.

Hann hevur verið deknur í kirkjuni í heili 42 ár. Nú hevur hann gjørt av at halda uppat og tað verður 22 november, sum er síðsti sunnudagur í hesum kirkjuárinum.

Tað var Jógvan Fríðrikson, bispur, sum handaði Hilmari Bech "Fortjenstmedaljen i sølv"

- Hennara hátign, Drotningin, letur tær hesa viðurkenning fyri drúgva og trúgva tænastu. Kirkjuliðið sigur á hendan hátt takk, og innstillingin til Drotningina við fylgjandi áheitan um viðurkenning er tøkk á serliga høgum støði, segði bispur, tá ið hann handaði honum heiðursteknið og skreytblað.

Hann segði, at kirkjuliðið virðismetir kallið sum kirkjutænari.

- Hjá Hilmari Bech er tænastan í stólinum sum deknur og við lestrarfjøl.

- Ein kirkjutænari livir við í fólksins gerandisdegi bæði gleði og sorg. Vanligar sunnudagar og løtur við frægd og gleði um dóp og brúðarvígslu. Og aðrar løtur, tá eygu ikki síggja klárt, og tárini renna og hjartað grætur. Tænarin gjørdi tænastu í halgidóminum, var á staðnum, tí staði har navn Guðs býr og hjarta hansara valdi sær ævinligan bústað.

Hilmar Bech hevur verið virkin í kirkjuni í Porkeri í mong ár, ikki bara sum deknur, tí hann hevur eisini verið í kirkjuráðnum í 36 ár harav hann var formaður í 20 og kassameistari í 30 ár.

- Saman við kirkjuliðnum her í Porkeri takka vit hjartaliga fyri tænastu tína Guði til heiðurs og menniskjum til signingar, segði Jógvan Fríðrikson.

Hilmar Bech segði, at tað var longu fyri tveimum árum síðani, at hann hálvavegna hevði avgjørt fyri seg sjálvan, at hann skuldi halda upp at sum deknur nú

Hann fegnaðist um, at so nógv fólk vóru komin saman í kirkjuni og sostatt vóru við til at gera gudstænastuna í gjár til eina hátíðarstund, sum hann ongantíð fór at gloyma og hann takkaði øllum teimum, sum hava fjálgað um og tikið hond um kirkjuna.

## Ongin bjóðar Jóannesi av

**Javnaðarflokkurin skal hava landsstevnu um tvær viku og tá ið freistin at stilla upp til formansvalið var úti, hevði ongin bjóða seg fram ímóti sitandi formanni**

LANDSSTEVNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verður ongin, sum bjóðar Jóannesi Eidesgaard sum formansvalevni hjá Javnaðarflokkinum, tá ið landsstevna verður um tvær vikur.

Flokkurin hevur landsstevnu í Havn annað vikuskifti og í viðtøkunum hjá flokkinum stendur, at uppskot til starvsnevndarlimir, skulu verða latin inn í seinasta lagi tríggjar vikur frammanundan.

Og av skrivstovu floksins verður upplýst, at onki uppskot er komið inn.

Sostatt er greitt, at ongin avbjóðari verður til Jóannes Eidesgaard, sum hevur verið formaður floksins í eitt áramál.

Tað var annars dúgliga gitt um eitt formansskifti, eftir at Javnaðarflokkurin fekk eitt søguliga vánaligt úrslit í eini veljarakanning hjá Kringvarpinum fyri eini tíð síðani.

Tá varð eitt sindur gjørt burtur úr um tað besta fyri flokkin kanska kundi verið Jóannes Eidesgaard tók ábyrgdina av tí vánaliga úrslitið og segði seg frá. Men tað var hann ikki sinnaður til og tí var eisini gitt um nakar mundi fara at bjóða honum av á landsstevnuni, tá ið formansval er.

Men so verður ikki og Jóannes Eidesgard verður sostatt sitandi.